Fra: Malan Johansen
Til: Kristvør H. Poulsen
Emne: SV: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Heimild at stovna almannagagnlig bústaðafeløg, økt lániheimild og útlendsk fígging, o.a.) til hoyringar
Dato: mikudagur, 8. november 2023 14:01:28

Hey Kristvør, sí viðmerkingar til uppskotið niðanfyri.

Viðmerkingar til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Mál nr. 23/20793-1)

Landsbankin hevur bara viðmerkingar til partin um fígging.

Sum málsetning eigur Húsalánsgrunnurin at útvega sær fígging so bíliga sum gjørligt, øllum borgarum at frama. Við at geva grunninum loyvi eisini at biðja um tilboð á fígging frá útlandinum, verður opnað upp fyri betri kapping um fíggingina og tað eigur at geva eina betri rentu.

Besta kreditvirðið hevur tó landskassin. Húsalánsgrunnurin er 100% almennur og tí er mest sannlíkt at grunnurin fær bestu rentuna við at landskassin tekur lán, og so lænir út aftur til Húsalángrunnin. Hetta eigur tí eisini at vera við sum ein møguleiki í lógaruppskotinum.

Vinarliga / Kind regards

Malan Johansen | Stjóri/Managing Director | Landsbanki Føroya | Kvíggjartún 1, 165 Argir, Føroyar
+298 226 225 | malan@landsbankin.fo | www.landsbankin.fo

Fra: Kristvør H. Poulsen <KristvorP@umhvorvi.fo>
Sendt: 23. oktober 2023 16:18
Til: Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Landsbanki Føroya <landsbankin@landsbankin.fo>; kf@kf.fo; bustadir@bustadir.fo; industry@industry.fo; osn@betri.fo.; Liv@liv.fo
Emne: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Heimild at stovna almannagagnlig bústaðafeløg, økt lániheimild og útlendsk fígging, o.a.) til hoyringar

Til hoyringarpartarnar.

Við hesum verður sent tykkum til ummælis uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Heimild at stovna almannagagnlig bústaðafeløg, økt lániheimild og útlendsk fígging, o.a.)

Møguligar viðmerkingar til uppskotið kunnu sendast til umhvorvi@umhvorvi.fo og skulu verða Umhvørvismálaráðnum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 13. november 2023 kl. 12:00.**

Vinaliga
Kristvør Poulsen, skr.
Umhvørvismálaráðið